# Løgreglan hevur ikki kett seg

**Løgreglan hevur ikki kett seg hetta vikuskiftið. Fýra bilførarar eru tiknir fyri rúsdrekkakoyring, og annars hava ferðsluóhapp, herverk, bardagar og annað upptikið løgregluna meðan onnur hava havt frí**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Júst farna vikuskiftið hevur ikki verið stórt øðrvísi enn onnur hjá løgregluni. Á støðini hava teir havt sítt at dragast við, men hóast steypafinalan var leygardagin, so var tó ikki talan um eitt lívligari vikuskifti enn vanligt.

Einastu beinleiðis avleiðingarnar av steypafinaluni var, at tveir mans vórðu tiknir úr Gundadali oman á støðina eftir dystin, tí teir høvdu fingið í so nógv at drekka og vóru dotnir av.




*Rúturin hjá Baby og barnaútgerð varð brotin um vikuskiftið, men løgreglan veit hvør hevur gjørt hetta*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Kvinna við tvey í promillu

Fýra fólk eru tikin fyri rúsdrekkakoyring og tvey teirra vórðu tikin innan fyri eitt korter leygarnáttina á Skálatrøð. Ein kvinna var í millum hesi fýra, og hon var eisini toppskorarin hetta vikuskifti í promillukoyring, tá hon varð máld at hava eina promillu oman fyri tvey.

Av løgreglustøðini verður sagt, at tað meiri enn so kemur fyri, at kvinnur verða tiknar fyri at koyra ávirkaðar, men at menninir tó eru so ruddiliga við yvirlutan.

Tíbetur hendi onki óhapp í hesum fýra førunum, men kunnu teir tiknu bilførararnir rokna við at missa koyrakortið.

### Skaðar á bilar

Rúsdrekkakoyring er ein afturvendandi trupulleiki, men eitt annað, sum altíð tekur eitt sindur av plássi í politirapportini, er skaðar á bilar.

Hetta vikuskiftið hevur herverk verið gjørt á onkran bil. Men tað sum næstan dagliga kemur fyri er, at skaðar verða gjørdir á parkeraðar bilar, har tann, sum hevur gjørt skaðan stingur av. Ein bilur bakkar á ein annan, og so rýmir førarin bara avstað uttan at boða frá, og tað er sera keðiligt hjá tí, sum hevur fingið skaða á sín bil.

### Herverk og bardagar

Sum vanligt er, so er eisini smávegis herverk gjørt í Havn um vikuskiftið. Onkur hevur stytt sær stundir við at bróta rútin í DER-bygninginum, har sum Baby og barnaútgerð er, men her veit løgreglan hvør hevur gjørt herverkið.

Onkrir minni bardagar hava eisini verið, og her endaði eitt rokilsi uttan fyri FK í miðbýnum við, at ein maður bleiv skuldsettur fyri brot á politiviðtøkurnar.

– Seks ungir mans vóru farnir til hendurs, og løgreglan kemur so á staðið fyri at tosa menninar til sættis. Men so er tað, at ein teirra brýtur ein fløsku niður í vegin framman fyri politibilin, og hann er nú skuldsettur fyri brot á politiviðtøkurnar.

### Bygdamaðurin og bussurin

Sunnunáttina skuldu nakrir ungdómar av bygd so heim aftur, eftir at hava verið ein túr í býnum. Hesi ungu høvdu leigað sær buss bæði suður og norður, men busssjaførurin kom ongantíð eftir teimum, tá tey skuldu heim og so vóru góð ráð dýr.

Hetta gjørdist ein ungur maður so argur um, at hann fór beint á løgreglustøðina at kæra sína neyð og vildi hava løgregluna at koyra hann norð, tá busssjaførurin ikki møtti upp sum avtalað.

Løgreglan hevði annað at gera, og bað mannin um at fara avstað aftur, men tað vildi hann ikki. Hann ringdi til alarmsentralin fleiri ferðir upp í saman, og dugdi annars ikki at uppføra seg sum fólk og tí varð hann settur í brummuna.

### Spentu tape tvørtur um vegin

Leygarnáttina fekk løgreglan boð um, at nakrir ungdómar høvdu spent tape tvørtur um vegin úti á Landavegnum.

– Hetta er ein rættiliga vandamikil sportur, men tíbetur hendi stóðst ongin skaði av hesum, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í morgun.

Um sjeytíðina sunnumorgunin ringdi ein kona á støðina. Maðurin, sum hon er skild frá, og sum hevur tilhald móti at koma henni nær, var kortini komin á dyr hennara um morgunin. Hetta boðaði konan løgregluni frá, og teir komu á staðið og fóru avstað við manninum, sum nú verður skuldsettur fyri at bróta tilhaldið og fyri at nokta at vilja upplýsa navn og bústað fyri løgregluni.

Og at enda var eisini ein tilburður, har løgreglan var noydd at steingja ein telefon. Viðkomandi, ið átti telefonina, ringdi áhaldandi til alarmsentralin og órógvaði, og tí ringdi løgreglan til Føroya Tele og fekk teir at steingja telefonina hjá viðkomandi.

– Alarmsentralurin skal bara nýtast í átrokandi førum, og hava fólk annað upp á hjarta, so eiga tey at ringja til vanligu telefonina (35 14 48, blðm.), sigur vakthavandi á løgreglustøðini í morgun.

# Talu-skrásetarin sendur til Florida

**Serfrøðingar arbeiða alt teir eru mentir fyri at fáa upplýsingar úr ferðmátaranum og talu-skrásetaranum, sum skrásetur hvat varð sagt í cockpittinum , og roknað verður við, at møgulig úrslit fyriliggja fríggjadagin**

FLOGVANLUKKA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Talu-skrásetarin, sum skrásetur alt ið verður sagt inni í cockpittinum, er saman við ferðmátaranum sendur til Florida til nærri kanningar. Áðrenn hava serfrøðingar á eini kanningarstovu í London hugt at skrásetarunum, men hava teir givið skarvin yvir, og tí eru skrásetararnir nú sendir til Florida.

Tað vísir seg at vera ógvuliga trupult at fáa upplýsingar úr skrásetarunum, tí partar av teimum hava fingið skaða, hóast teir eru gjørdir til at klára 1100 hitastig í ein hálvan tíma.

– Taluskrásetarin er nú ávegis til Florida, har tey hava fólk, sum eru serfrøðingar í at fáa fatur í upplýsingum, sum annars eru truplir at fáa hendur á, segði virkandi stjórin í skaðanevndini, Grete Myhre, við Avisens Nyhedsbyrå fríggjadagin.

– Upplýsingarnir úr skrásetarunum eru ógvuliga týdningarmiklir fyri at vit kunnu staðfesta tað, sum er sagt í teimum ymsu samrøðunum í miðlunum. Eisini er møguleiki fyri, at aðrir ókendir upplýsingar koma fram. Okkurt sum flogskipararnir og tey ferðandi hava gloymt at greitt frá, ella okkurt vit hava gloymt at spurt tey um, sigur Grete Myhre.

Tað verður neyvan fyrr enn fríggjadagin at vit vita, um nakað brúkbart fæst úr skrásetarunum, men Grete Myhre er bjartskygd og segði við Avisens Nyhedsbyrå fríggjadagin, at tey vóna at fáa upplýsingar úr skrásetarunum.

### Ikki punktering

Nógvar gitingar hava verið frammi um orsøkina til vanlukkuna. Onkrar teoriir hava verið um, at flogfarið punkteraði, tá tað setti seg, men hetta er helst ikki tilfeldið.

Gummirestir eru funnar á breytini, men kanningarleiðarin í skaðanevndini, Birgir Andreas Bull, sigur við VG, at gummiið ikki stavar frá nøkrum punkteraðum hjóli.

– Vit halda áfram við arbeiðinum við at savna fakta saman, og vit gera fleiri samrøður við flogfelagið. Skaðanevndin hevur funnið fram ávís ting, sum gera at onkrar orsøkir tykjast meiri upplagdar enn aðrar, men eg kann ikki siga meiri um hetta beint nú, segði Birgir Andreas Bull sigur við VG fríggjdagin.

# Løgmaður um flogvanlukkuna á Stord

– Tað er einki at ivast í, at allir føroyingar eru skelkaðir av tí, sum hendi týsdagin í seinastu viku, tá eitt flogfar hjá Atlantsflogi fór út av breytini í Stord í Noregi og fýra fólk doyðu.



– Og sjálvandi eri eisini eg skelkaður, men vit vita, at vit fara at fáa eina nágreiniliga frágreiðing um orsøkina til tað, sum hendi. Hesa frágreiðing og tess niðurstøðu koma bæði Atlantsflog og eftirlitið hjá felagnum Statens Luftfartsvæsen at fyrihalda seg til.

– Hendingin hevur ivaleyst ført tað við sær, at Atlantsflog má sannføra brúkaran, og tað vil so siga fyrst og fremst okkum føroyingar um, at trygdin og mannagongdir annars eru í hásæti, soleiðis at vit eisini í framtíðini kunnu kenna okkum trygg við at flúgva við Atlantsflog.

– Spyrst tú um mítt álit á Atlantsflog, so eri eg, sum stórur brúkari av Atlantsflog sjálvandi ávirkaður av vanlukkuni í farnu viku. Men týsdagin fari eg aftur á flog við Atlantsflog í arbeiðsørindum til Noregs, sigur løgmaður, Jóannes Eidesgaard.